**10 TING UM** Mikkel Kessler

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Heimsmeistarin

FARNA **VIKUSKIFTIÐ** GJØRDIST HANN AFTUR **HEIMSMEISTARI** Í BOKSING EFTIR EIN **HARÐAN** DYST ÍMÓTI **BRETSKA** HEIMSMEISTARANUM. **MIKKEL KESSLER BYRJAÐI** AT BOKSA LONGU SUM **13** ÁRA GAMAL

**1** Mikkel Kessler hevur enska mammu og danskan pápa.

**2** **Kessler er føddur í 1979 og er sostatt 31 ára gamal.**

**3** Hann er føddur og býr framvegis í Keypmannahavn í Danmark.

**4** **Hann byrjaði at boksa longu sum 13 ára gamal.**

**5** Í trý ár boksaði Kessler sum amatørur. Hann megnaði at vinna 44 dystir og bert tapa tríggjar hesi árini.

**6** Kessler hevur vunnið danskt meistaraheiti fimm ferðir, og hann hevur eisini vunnið norskar og norðurlendskar kappingar.

**7** Sum yrkisboksari hevur hann boksa 45 dystir. 43 av teimum hevur hann vunnið – 32 av teimum upp á knockout.

**8** Kessler boksar í bólkinum super miðalvekt, og tá skal hann ikki viga meira enn 76,2 kilo.

**9** Farna vikuskiftið vann Kessler WBC heimsmeistaraheitið, eftir at hann hevði boksað ímóti bretanum Carl Froch, sum hevði hetta beltið. Hetta var fyrstu ferð, at Froch tapti ein dyst.

**10** **Næsti dysturin hjá Kessler verður ímóti Allan Green.**

## SITAT



Ein lygn er komin hálvan vegin kring jørðina, áðrenn sannleikin er komin í buksirnar.

***Sir Winston Churchill***

## MIÐLARNIR OG EG



## SOLBY ELIASEN

PROGRAMLEIÐARIN LURTAR ALTÍÐ EFTIR ÚTVARPI OG LESUR SLATURBLØÐINI UM HON DETTUR UM TEY.

**MÍTT BLAÐ:**
Eg lesi altíð bæði Dimmalætting og Sosialin. Oftari netútgávurnar, tí eg finni flestu tíðindini á netinum. Eitt blað sum Femina dámar mær væl, men eg standi ikki fremst í røðini hvørja ferð tað kemur út fyri at ogna mær tað. Vikubløð eru veruligur hugnalesnaður fyri mítt viðkomandi.

**HEIMASÍÐA:**
Fyrst og fremst tíðindaheimasíður, men eisini dámar mær væl at vitja ítróttarheimasíður, kjaksíður og facebook brúki eg eisini nógv.

**MÍN TÓNLEIKUR:**
Mær dámar næstan allan tónleik. Av tí at eg eri yngst av fýra systkjum, havi eg altíð lurtað nógv eftir 70'ara og 80'ara tónleiki, og tað hevur tískil fylgt mær allan vegin á tann hátt, at eg ikki havi verið so up to date við tónleiki. Men nú synirnir eru farnir at hava áhuga fyri tónleiki, ger tað sítt til, at mamman eisini hoyrir nakað av tí nýggjasta nýggja.

**MÍTT SOSIALA NETVERK:**
Eg brúki nógva tíð inni á Facebook, men eg brúki ikki sjálv netverkið til annað enn at finna fólk, senda boð ella tjatta.

**MÍN DVD:**
Eg hyggi sjáldan at dvd, men filmurin, Primal Fear við Richard Gere og Edward Norton, er ein framúr góður filmur.

**MÍTT MAGASIN:**
Eg haldi Kvinnu, mær dámar væl at kaga í tað, og tað er uttan iva lekrasta blaðið í landinum, tá tað kemur til útsjónd. Innihaldsliga hevði eg viljað, at har var meira tekstur og færri lýsingar. Eitt annað magasin, sum mær dámar væl, er Journalisten. Tað lesi eg altíð, tá eg fái møguleikan til tað.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ:**
Eitt sindur av hvørjum, vil eg siga. Á føroysku síðuni dámar mær sera væl nýggju sendingarnar í sjónvarpinum Refleksjón og Frætt og fregnað og eisini Fólksins rødd og aðrar røðir. Samstundis dámar mær eisini væl røðir sum til dømis CSI og Criminal minds - eins og mær dámar sera væl enskar dokumentarrøðir og krimirøðir.

**MÍN BÓK:**
Seinnu árini havi eg ikki lisið serliga nógvar fagurbókmentir, men ein spennandi krimibók er altíð góð. Hinvegin dámar mær minst líka væl fakbøkur og journalistiskar forteljingar frá spennandi uppgávum úti í markini.

**MÍTT ÚTVARP:**
Útvarpið er og hevur altíð verið tendrað í mínum heimi. Eri eg inni, er útvarpið frá. Mær dámar so sera væl at lurta eftir sendingum, har ymisk evni verða viðgjørd, har góður tónleikur er ella bara har ein persónur, sum brennir fyri onkrum, greiðir frá. Útvarp hevur tann fantastiska eginleikan, at er tað ein persónur, ið veruliga hevur nakað upp á hjartað, er tað altíð áhugavert at lurta. Einfalt, men gott.

**MÍN TELEFON:**
Eg havi eina ganska vanliga Nokia telefon. Hon er reyð og kann ikki so nógv annað enn at ringja og smsa. Tað er eisini nóg mikið fyri meg, tí eg havi ikki brúk fyri telefonini til so nógv annað – fyribils havi eg tað fínt við, at til dømis teldupostar bert koma inn á mína teldu, og at tað IKKI brummar í lummanum, hvørjaferð ein t-postur poppar inn.

**HVAT VILT TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ:**
Reality-shows. Annars plagi eg altíð at geva so at siga øllum ein kjans. Eg dømi ikki eina sending, áðrenn eg havi hugt ella lurtað eftir henni. Men eg kann vera skjót við zapparanum, um eg ikki eri fangað aftan á fyrstu 5-10 minuttirnar.

**HVAT IRRETERAR TEG Í MIÐLUNUM:**
Tað kann irretera meg, tá eg komi inn á eina heimasíðu, har eg vænti mær tíðindi, og so fái eg alt møguligt annað tilfar, sum eg ikki havi brúk fyri – eins og tað eisini irreterar meg, at tað eru so nógvar heimasíður til, sum eftirhondini levera tilfar, sum onnur halda er journalistiskt. Tí sum oftast er tað óviðgjørt tilfar.

**HVAT VILT TÚ HAVA MEIRA AV Í MIÐLUNUM?**
Eg vil hava meira sendingar ella greinir, sum hava tyngd og dygdargott tilfar, eg vil hava fleiri góð og hugtakandi portrettir av føroyingum og útlendingum í øllum miðlum, eg vil hava minni referandi journalistikk og meira viðgjørt tilfar við kritiskum vinklum, og sum ger, at eg sum brúkari verði tilvitað um týdningin av at hava fjølmiðlar.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos